SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Skjaldkertil – skurðviðgerð (Hemithyroidektomi)

## Um skurðviðgerðina

Skurðviðgerðin inniber:

- Gjøgnum eitt snitt í húðina framman á hálsinum tekur læknin ein part av kertlinum.
- Vevnaðurin verður sendur til kanning

Skurðviðgerðin er í fullari doyving. Møguliga verður ein plastikslanga/ eitt dren lagt í skurðin. Drenið ger so blóð og væta sum er til yvirs, kann dryppa í ein posa. Ikki øll fáa lagt dren.

## Eftir skurðviðgerðina

Eftir skurðviðgerðina verður eitt tunt arr á uml. 5-8 cm niðarliga á hálsinum. Teir fyrstu tímarnar efter skurðin liggur tú á Viðrakning til tú ert heilt vakin. Her eru starvsfólk um teg alla tíðina.
Tá tú ert heilt vakin, verður tú flutt/ur á seingjardeild.
Tú fært bjóðað pínustillandi fyrstu dagarnar.
Tað er týðningarmikið at tú kemur upp at ganga skjótt eftir skurðviðgerðina.

## Útskrivan

Eitt møguligt dren verður oftast tikið dagin eftir skurðviðgerðina. Tá kálkinnihaldið í blóðnum er normalt, kanst tú útskrivast. Blóðroyndir verða tiknar undir innleggjan.

## Eftir útskrivan

Sjúkramelding verður avtalað við skurðlæknan. Um tú hevur eitt fysiskt hart arbeiði, kann verða at sjúkrameldingin er 1-2 vikur.
Tú kanst brúsa tær, tá møguliga drenið er tikið, plástrini skulu tó haldast turr. Bað og svimjing er frámælt fyrstu 10 dagarnar eftir skurðviðgerðina vegna vanda fyri bruna.
Tú fært eina tíð til kontroll av skurðinum, og svar upp á kanningina av skjaldkertlinum.
Arrið kann vera hart fyrstu mánaðarnar. Tað er vanligt, og ikki neyðugt við viðgerð. Tað blívur vanliga bleytari eftir 3-4 mánaðir. Fyri best møguligt kosmetiskt úrslit, er tað gott at ikki fáa beinleiðis sól á arrið fyrsta árið, evt. dekka við plástri ella nýta sólkrem faktor 50.
Stofskiftið skal kannast við blóðroynd eftir skurðviðgerðina, fyri at meta um neyðugt er við tablett viðgerð fyri stofskiftið.

## Komplikatiónir/eftirsjúka

Vegna smærri bløðingar í sambandi við skurðviðgerðina, kann húðin runt um sárið verða blá. Hetta hvørvir eftir 1-2 vikur. Tað er ein lítið kjansur fyri, at tað bløðir for nógv frá sárinum fyrstu tímarnar eftir skurðviðgerðina . Tá kann verða neyðugt at steðga bløðingina við nýggjari lítlari skurðviðgerð.

Tað kann koma fyri, tó sjálvdan (1-2 út av 100), at røddin broytist í samband við skurðviðgerðina. Tað er tó bara viðvarandi hjá 1 út av 200. Fyri at kanna røddina verður hugt í hálsinum eftir skurðviðgerðina

Í sera sjálvsomum førum verður kálkinnihaldið í blóðum for lágt eftir skurðviðgerðina. Um tað er for lágt, kann tað viðgerðast við kálktablettum og vitamintilskot.

Fáir sjúklingar fáa bruna í sárið. Tekin upp á bruna eru: *Trot (hævilsi), roði, eymleiki, møguliga febur*

Um tú fært tekin upp á bruna ella órógvandi vætusamling, eigur tú at ringja til lækna. Gerandisdagar kanst tú ringja til Oyrnadeildina kl 10-12 á tlf.nr. 304622. Annars setur tú teg í samband við tín kommulækna ella læknavaktina á 1870.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo